# Kanna onnur møgulig oljuøki

OLJULEITING
*Jan Müller*

Nú um dagarnar høvdu jarðfrøðiligu serfrøðingarnir hjá Oljumálastýrinum sett umboðum fyri oljufeløgini, ið hava leitiloyvi á landgrunninum, stevnu í Hoyvík, har umrøtt varð, hvussu farast skal víðari fram við kanningum inni á stóru basaltøkjunum við Føroyar. Martin Heinesen, jarðfrøðingur sigur, at endamálið við arbeiðsfundunum var at vita, hvussu vit kunnu finna nýggjar leitingarmøguleikar inni á føroyskum øki uttan fyri tey økini, har tað nú verður leitað á.

– Landgrunnurin er so trupul, so vit mugu royna at hyggja frameftir og vita, hvørjir møguleikar eru sigur Martin Heinesen. Hann vísir á, at stórur partur av landgrunninum liggur fjaldur undir tjúkkum basalti, og hóast roynt hevur verið at skjóta seismikk og gera aðrar kanningar, so er tað framvegis torført at fáa nóg nógvar upplýsingar um løgini undir basaltinum og harvið eisini møguligar oljugoymslur. Martin Heinesen sigur, at teir við fundunum royna at bróta upp úr nýggjum og harvið kunna skapa betri grundarlag fyri framtíðar útbjóðingum.

Feløgini, sum hava fingið leitiloyvi, hava nevniliga bundið seg til at brúka nakað av pengum uppá slíkar verkætlanir, og hetta var so tann fyrsti fundurin í tí sambandi. Tað eru oljufeløg, sum longu nú halda seg síggja, at umstøður eru fyri at finna olju og gass undir basaltinum.



*Frá fundinum í Oljumálastýrinum týsdagin, tá umboð fyri oljufeløg og føroyskar myndugleikar møttust at tosa um framtíðina uttan fyri verandi leitiøki*

*Mynd Jens K Vang*

# Skótalið Sigmunds Brestissonar fyllir 75 ár

Kyndilsmessudag fyllir elsta skótaliðið í landinum 75 ár.

Føðingardagin hevur liðið móttøku í Skótahøllini og dagin eftir verður veitsla.

Fríggjadagin 2. februar eru 75 ár liðin síðani teir fýra havnadreingirnir Eskild Christiansen, Arne Ellingsgaard, Pauli Christiansen og Zacharias Poulsen stovnaðu Skótalið Sigmunds Brestissonar.

Skótarørslan var tá av álvara farin at breiða seg um heimin, og neistin, sum hesir dreingirnir festu henda vetrardagin í 1926, gjørdist skjótt bál. Í hesi 75 árini hava fleiri túsund havnardreingir verið úlvaungar, skótar, birkenbeinarar og rovarar í SSB.

SSB hevur havt góðar og minni góðar tíðir, men øll hesi árini hevur verið lív í fylkinum - fyrst á Bakkahellu og síðani í Skótahøllini við Havnará.

Eftir at hava arbeitt við skótaítróttini í eini trý-fýra ár keypti SSB síni fyrstu høli á Bakkahellu fyri 1000 krónur. Í hesum smáu húsnum høvdu skótarnir so skótaarbeiði sítt fram til í 1956, tá tann prýðiliga Skótahøllin var liðug og gjørdist karmur um skótalívið í SSB.

Nógvir tættir hava eyðkent SSB síðani byrjan. Eitt eru summarlegurnar, eitt annað eru tær føstu kappingarnar og eitt triðja var tann árliga skótaveitslan, sum ikki minst tær ungu genturnar gleddu seg til.

Skótaveitslurnar vóru í mong ár hildnar í Tórshøll - og seinri í Klubbanum - við borðhaldi, undirhaldi, sangi og dansi. Ikki minst vóru skótaveitslurnar kendar fyri skemt, spæl og sang, tí nógvar góðar kreftir innan leik og tónleik vóru í skótaarbeiðinum.

SSB var ikki meiri enn tvey ár, tá liðið var á fyrstu skótaleguni í Danmark, og síðani hava skótar úr SSB verið á mongum legum, jambore´eum og jamborettum kring stóran part av heiminum. Men í minnunum hjá teimum flestu skótunum standa óivað túrarnir, kappingarnar og legurnar í tí føroysku náttúruni.

Liðið fekk rættiliga góða undirtøku frá byrjan, men bestu undirtøkuna hevði SSB óivað seinast í 30-unum og aftur í 50- og 60-árunum. Í 1939 vóru so nógvir skótar komnir uppí, at 2. lið varð stovnað. Í 1961 varð 3. lið stovnað og tá vóru eitt skifti 18 patruljur í SSB. Men hesi árini batnaðu tíðirnar, og tá fleiri ítriv - m.a. vetraríttrótturin - stóðu teimum ungu í boði, minkaði áhugin fyri skótaarbeiðnum nakað, so seiniri varð lagt saman aftur í tvey lið.

Tá fleiri yngru dreingir høvdu hug at koma upp í skótaarbeiðið, varð úlvalið stovnað seinast í 20-unum. Úlvaliðið hevur ikki verið virkið alla tíðina, men eitt skifti - frá 50-unum og eini 20 ár fram - vóru tvey lið og 8 patruljur.

Eisini eldri skótar høvdu hug at halda fram, og rovaraflokkurin sá dagsins ljós í 30-unum. Í 60-unum varð eisini Sankta Jørundsgildið sett á stovn fyri gamlar skótar.

SSB var farið um tey 40, tá stig vórðu tikin til at fáa gentur upp í skótaarbeiðið hjá teimum gulu skótunum. Tær bláu gentuskótarnir skipaðu seg í Skótalið Tóru Sigmundsdóttir í 1969.

Saman eru SSB STS skipað í Skótafylki Sigmunds Brestissonar. Í dag eru umleið 130 skótar í fylkinum. Í nógv ár lá talið um 200-250, og tá talið var av tí mesta, høvdu meiri enn 300 úlvar, skótar og rovarar sína gongd í Skótahøllini.

## Móttøka

Í samband við at Skótafylki Sigmunds Brestissonar verður 75 ár, og Skótahøllin er bygd út, verður opið hús í Skótahøllini við Havnará fríggjadagin 2. februar kl. 16.00 til 19.00.

## Skótaveitsla

Skipað verður eisini fyri stórari veitslu nú SSB fyllir 75 ár. Veitslan verður í Hoydølum leygardagin 3. februar kl. 16. Umboð fyri onnur skótalið í Føroyum, landsstýrið og býráðið eru boðin við.

Eisini verða fyrrverandi skótar í SSB og STS bodnir við. Atgongumerki á kr. 175,00 fáast við at venda sær til 31 10 30 ella 31 77 72.



*Mynd frá skótaferð í fimtiárunum: Thomas Arge, Dan Mortensen, Eðin Jacobsen, Eyðun Johannessen, Dánjal Húsgarð og Christian Christiansen*


Bilar frá
P/F Esmar Simonsen

Daewoo Leganza SX 2.0 133 HK
Árg.: Juli 1998 · Litur: Grønt met. · Koyrt: 8.900 km
Nýprísur: 183.200,- · **Prísur: kr. 139.800,-**

VW- Transporter LT 35 (dupult kabina v/last)
Mot.: 2.4 Turbo Diesel · Árg.: Febr. 1992 · Litur: Hvítt
Koyrt: 128.000 km· **Prísur: kr. 115.000,-**

Toyoat Camry Hatcback
Árg.: 1987 · Litur: Reytt met. · Koyrt: 214.000 km
**Prísur: kr. 20.800,-**

Ford Mondeo Turbo Diesel
Árg.: 1992 · Litur: Blátt · Koyrt: 165.000 km
**Prísur: kr. 61.800,-**

Daihatsu Charade
Árg.: Nov. 1989 · Litur: Reytt · Koyrt: 97.000 km
**Prísur: kr. 22.000,-**

Brúktbilasølan hjá
P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29

Sosialurin - 311820